gult2 cyan2 magenta2 svart2






gult3 cyan3 magenta3 svart3



# Kapping um skúla í Suðuroy

**Í heyst verður arkitekta-kapping um tann nýggja miðnámsskúlan, sum skal byggjast í Vági**

SKÚLABYGGING
*Áki Bertholdsen*

Tað gongur støðugt framá við arbeiðnum at fyrireika byggingina av nýggja miðnámsskúlanum, sum skal byggjast í Vági.

Studentaskúlin í Vági hevur húsast undir sera vánaligum korum og hann heldur til í fleiri húsum, sum ikki eru gjørd til endamálið og sum heldur ikki eru so væl hóskandi, sum tey áttu at verið

Miðnámsskúlin í Suðuroy er ein deild undir studentaskúlanum í Hoydølum og tá ið studentarnir í Suðuroy fingu prógvini handað mikudagin, var skúlastjórin, Mads A. Winther í Vági og helt røðu fyri teimum nýklaktu pisunum.

– Umframt fakliga vitan, skulu næmingarnir eisini hava eina røð av førleikum. Av teimum førleikunum eru evnini at læra at læra ein av teimum týdningarmestu, segði Mads A Winther í røðu síni fyri studentunum.

Hann segði, at fyri at hetta skal eydnast, er tað neyðugt, at næmingarnir hava eitt gott umhvørvið.

– Ein fortreyt fyri at hava tað, er at arbeiðsumhvørvið er gott hjá øllum á skúlanum, eisini lærarunum.

– Tað góða umhvørvið skal stuðla undir frálæruhættir og menna tykkara evni til sjálvi at leita sær lærdóm so at hendan prosessin kann halda fram alt lívið, sama hvat starv tit fáa.

## Arkitektakapping

Mads A. Winther segði at hann vónaði, at tað fór at bera til at skapa skúlanum í Suðuroy betri umstøður.

Tað, hann sipaði til, er ætlanin at byggja ein nýggjan miðnámsskúla í Vági.

Og tað skilst, at tað gongur framá við arbeiðnum at byggja skúlan

Mads A. Winther segði, at fyrireikingin er komið so mikiå væl áleiðis, at nú í september verður arkitektakapping útskrivað at byggja skúlan.

Grundstykkið er fingið til vega, tað er beint vestanfyri bygdina, omanfyri Vatnið og har skal skúlin so byggjast.



*Tað hevur stóran týdning av varðveita studentaskúlan í Suðuroynni, sigur Mads A. Winther stjóri á Føroya Studentaskúla*

– Vónandi verður hildið á við arbeiðnum, so at ætlanin ikki dettur niðurfyri, men at skúlin verður bygdur, segði skúlastjórin.

Hann legði eisini stóran dent á, hvussu stóran týdning tað hevur, at studentaskúlin er í Suðuroynni.

– Hann ger, at tað ber til hjá ungdóminum at verða verandi í heimliga umhvørvinum tey kvæmu árini frá 16-19 ár.

– Við at vera her, geva tit tykkara íkast til tað lív, sum er her á staðnum og tann dynamikk, sum ungdómur gevur einum samfelag.

– Uttan tykkum hevði verið tómligt í Suðuroynni, segði Mads A. Winther.

# Vit kunnu ikki liggja í naggatódn í heilum

**Landsstýrismaðuri í vinnumálum heldur, at tíðin nú er búgvin til at umhugsa støðuna hjá Strandferðsluni, Postverkinum og øðrum almennum stovnum**

ALMENN UMSITING
*Áki Bertholdsen*



Brimil. Teistin. Postverkið. Føroya Tele.

Hetta eru tvey skip og tveir almennir stovnar, sum hava fingið landsstýrismannin í vinnumálum at umhugsa støðuna.

Tað gekk eitt hálvt ár at fáa Brimil í sigling, og fyribils eru tríggir mánaðir, síðani nýggja sandoyarskipið, Teistin, varð liðugur, men enn røkist onki fyri, at hann sleppur í sigling.

Hesi bæði nýggju, stásiligu almennu skipini lógu og liggja svínabundin í mánaðir, tí at semja ikki fæst um lønina hjá einum parti av manningini, sum skal sigla við teimum.

Somuleiðis hevur eisini stór ósemja verið um viðurskiftini hjá postverkinum.

Og hetta heldur Bjarni Djurholm, kann ikki halda fram.

– Eitt framkomið samfelag, kann ikki liggja í naggatódn í heilum, tí at ósemja er um mál, sum í mongum førum eru smáttarí, sigur hann.

Tí heldur hann, at tíðin nú er búgvin til at umhugsa støðuna við teimum almennu stovnunum, ikki minst hjá Strandferðsluni og hjá Postverkinum, sum hann sjálvur umsitur í landsstýrinum.

Og hann heldur, at ein annar stovnur, Føroya Tele, sum hann eisini umsitur, kann brúkast til fyrimynd í teimum metingum, sum nú skulu gerast.

– Eg haldi, at vit nú eiga at umhugsa at umskipa Strandferðsluna og Postverkið í almenn partafeløg, eins og Føroya Tele nú er blivið tað.

## Flyta samráðingarrættin

Hann dylir ikki fyri, at sporini ræða. Men tað eru eisini útlitini fyri framtíðina, sum nú fáa hann at taka støðuna upp til umhugsunar.

Eitt nú er lítil ivi um, at Strandferðslan skal hava nógv nýggj skip tey komandu árini, tí flotin er uppslitin. Men støðan skal helst ikki verða tann, at sáttmálatræta skal taka seg upp um hvørt skip, so at tey fyrst skulu liggja í mánaðir, áðrenn tey sleppa í sigling.

Tað eru eisini stórar rembingar á Postverkinum.

Bjarni Djurholm heldur, at ein vegur at sleppa undan hesum trupulleikunum, er at umskipa stovnarnar so teir verða almenn partafeløg.

Endamálið við umskipingini eigur at vera, at flyta samráðingarrættin frá fíggjarmálastýrinum yvir til stovnarar sjálvar, so at teir sjálvir fáa ábyrgdina av at samráðast um sáttmálar við teirra egna starvsfólk.

*– Kanska kundu vit sloppu undan nógvum trupulleikum um Strandferðslan og Postverkið vórðu umskipað til almenn partafeløg, so at starvsfólkið ikki longur skal samráðast við Fíggjarmálastýrið um løn, men beinleiðis við stovnsleiðslurnar, heldur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum*

Landsstýrismaðurin vísir á, at Síðani Føroya Tele bleiv alment partafelag, hevur stovnurin sjálvur samráðst við starvsfólkið um lønir og sáttmálar.

– Og tað skerst ikki burtur, at tað hevur gingið rættiliga smidliga. Tað kann væl verða orsøkin til at tað hevur gingið so smidliga, er júst tí, at starvsfólkið samráðist beinleiðis við arbeiðsgevaran, heldur enn sum fyrr, at samráðast við ein triðjapart, sum var Fíggjarmálastýrið.

– Eg haldi, at arbeiðsfólkið hevur aðrar kenslur mótvegis sínum arbeiðsplássi, nú tey sleppa at samráðast beinleiðis við leiðsluna um viðurskiftini, heldur enn at samráðast við triðja part.

Bjarni Djurholm heldur eisini, at tað er øvugt mannagongd, at starvsfólkið á t.d. Postverkinum samráðist um løn og sáttmála við Fíggjarmálastýrið, men at leiðslan á Postverkinum síðani noyðast at seta set saman við Vinnumálastýrinum at royna at útvega peningin.

– Í hesum broytiligum tíðum kann tað væl vísa seg, at skipanin, sum Føroya Tele hevur, er tann frægasta og tað haldi eg, er vert at umhugsa við atliti at støðuni hjá Postverkinum og Strandferðsluni.

– Tað kann væl vera, eitt meiri beinleiðis samband ímillum starvsfólk og stovnsleiðslu, ella eitt slag av nærdemokrati á stovnunum, hevði gagnað øllum pørtum og hevði knýtt starvsfólkið tættari at stovnum. Ein slík skipan hevur eisini tann stóra fyrimun, at ábyrgd og myndugleiki fylgist at, ístaðin fyri at hjá Strandferðsluni og Postverkinum, er tað Fíggjarmálastýrið, sum hevur myndugleikan og stovnsleiðslurnar og Vinnumálastýrið, sum hava ábyrgdina.

Men so leggur hann afturat, at hetta er ein politiskur spurningur.

– Og royndirnar hingartil hava so víst, at tað er ikki lætt at fremja broytingar av hesum slagi, sigur Bjarni Djurholm.